# Landsstýrið nýtti revolvarametodir

ÍLØGULOFTIÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Heðin Mortensen varaborgarstjóri sigur at kommunurnar vóru tvungnar at góðtaka íløguloftið hjá landsstýrinum*



*Høgni Hoydag sigur, at íløguloftið var ein avtala millum kommunurnar og landsstýrið*

Varaborarstjórin í Havn, Heðin Mortensen vísir á, at tað er beinleiðis skeivt sum Høgni Hoydal, landsstýrismaður í kommunumálum førir fram, at íløguloftið ella samlaða játtanin fyri íløgum hjá kommununum er ein avtala millum kommunurnar og landsstýrið.

– Tá man hevur ein revolvara í pannuni fyri at góðtaka kravboð frá landsstýrinum, so er tað ikki nøkur avtala í mínum hugaheimi. Kommunurnar fingu at vita frá landsstýrinum, at íløguætlanin fyri 2002 varð ikki meira enn 160 milliónir krónur. Vit fingu eisini at vita, at um kommunurnar ikki tóku av hesum 160 milliónunum, so fór landsstýrið at leggja eitt uppskot fyri løgtingið, har tað varð samtykt, at soleiðis fór íløguloftið at vera, sigur Heðin Mortensen, varaborgarstjóri í Havn.

– Høgni Hoydal kann kalla hetta hvat hann vil, men fyri okkum er hetta eitt diktat, eini kravboð frá landsstýrinum. Høgni førir eisini fram, at tað ber til at býta í millum kommunur sum ikki nýta sína kvotu og aðrar sum hava størri tørv. Men hetta ber slett ikki til í veruleikanum, tí slíkar flytingar kunnu bara gerast innan ávís øki í landinum. Um ein kommuna í Streymoynni, ella í Hesti, Koltri og Nólsoy ikki nýta sín part av íløgukvotuni, so kann Havnin fáa tað sum loypir av, og hetta forslær einki, sigur Heðin Mortensen.

– Høgni kann vera so diplomatiskur sum hann vil og siga at vit hava misskilt, men í veruleikanum er hetta revolvarametodir, sum landsstýrið hevur nýtt í samband við íløguloftið hjá kommununum. Vit hava góðtikið íløguloftið við revolvaranum fyri pannuni, tí vit høvdu ongan annan møguleika og so kann Høgni Hoydal tosa um eina avtalu sum hann vera vil, sigur Heðin Mortensen.

## Landsstýrið áleggur

Heðin Mortensen vísir á, at landsstýrið áleggur kommununum alt størri skyldur, og tí má samband vera millum skyldur og íløgur.

– Vit hava fingið álagt gjøgnum lóg at byggja skúlar, vit hava fingið ábyrgdina fyri barnaansingini og eldraøkið, sum verður tað næsta. Her er slett ikki samanhang í. Høgni Hoydal sigur, at vit kunnu prioriterað ørvísi, eitt nú kunnu vit minka um havnaíløgurnar. Hetta hendir samstundis sum vit fáa álagt frá landsins myndugleikum at útbyggja havnina, tí tvey nýggj stór ferðamannaskip, Norrøna og Smiril eru í gerð. Og politiskt er tað eisini avgjørt at hesi skip skulu sigla út frá Havnini. Fyri okkum merkir hetta, at vit skulu brúka eini 35 milliónir fyri at dýpa havnina fyri at hesi skip kunnu leggja at. Vit hava ikki fingið lovað eitt klovið oyra í endurgjaldi frá landsins myndugleikum til hesa eykaíløgu. sigur Heðin Mortensen, varaborgmeistari.

– Tá barnaansingin varð løgd á kommunurnar fekk Tórshavnar Kommuna eina rokning frá landsstýrinum upp á 13 milliónir krónur, tí ein útjavning skuldi fara fram. Eg haldi slett ikki, at landsstýrið hevur uppført seg serliga væl móti Havnini, sigur Heðin Mortensen.

## Størri tørv

– Um Havnar kommuna hevði havt aðrar møguleikar at hækka íløguloftið, so høvdu vit havt gjørt tað, landsstýrið var hvørki til at høgga ella stinga í. Vit fingu 68 milliónir av íløgukarminum, og av tí at vit gjørdu avtalur við aðrar kommunur kring okkum kom hetta tað upp á 74 milliónir, og hetta er nóg for lítið, sigur hann.

Hvussu stórur er íløgutørvurin hjá Tórshavnar Kommunu?

– Skuldi vit loyst barnaansingartrupulleikan, so kundu vit nýtt 80 milliónir krónur. Vit hava eisini tann trupulleika, at vit í dag mugu gera íløgur í eldraøkið, ein uppgáva sum landsins myndugleikar hava forsømt kring alt landið. Kommunurnar royna í dag at loysa eldraøkið fyri skomm skyld, men hví ger landið einki við tað, her er talan um eitt landsmál. Vit hava brúkt eini 20-25 milliónir bara til eldraøkið í Havnini. Vit kundu havt brúkt hesar pengar til onnur øki, eitt nú barnaansingina og sagt við landsstýrið, at hetta økið eiga til. Tó, fyri skomm skyld, hava vit valt at gjørt hesar íløgur, sigur Heðin Mortensen, varaborgmeistari.

## Ongin sjálvkritikkur

Heðin Mortensen undrast stórliga á, at grundgevingin fyri at kommurnar ikki mugu brúka meira enn 160 milliónir krónur e,r at vit ikki aftur mugu invisterað okkum út á sjógv.

– Hetta hongur ikki saman. Tí hví skulu kommunurnar hava eitt íløguloft, tá landsstýrið sjálvt onki íløguloft hevur? Landsstýrið byggir tunnlar, vegir, ferjur, flogvallir og eg veit ikki hvat. Hjá landsins myndugleikum er onki mark. Tað undrar meg, at skilt verður so nógv í millum tveir myndugleikar. Eg haldi, at Tórshavnar Kommuna hevur dugað væl at húsast og henni nýtist ikki nakra administratión frá landsins hægstu myndugleikum fyri sínum íløgum, sigur hann.

Men er tað ikki rætt, at skuldin hjá kommununum var vorðin ein veldugur kleppur um beinini í nítiárunum og at fleiri kommunur høvdu ikki sýnt ábyrgd viðvíkjandi íløgum í áttatiárunum?

– Jú tað er rætt, men hetta kann ikki sigast um Tórshavnar Kommunu, Vit skylda ikki eingang eina álíkning, so hjá okkum stendur væl til, sigur Heðin Mortensen.

– Og hvar hevur so landseftirlitið verið, tá kommunur kring landið nærum eru farnar á húsagang. Mær vitandi skulu allar kommunum lata fíggjarætlan og rokniskap til Kommunala Eftirlitið á hvørjum árið, so her er nakað sum hevur haltað hjá landsins myndugleikum, sigur Heðin Mortensen.

## Høgni Hoydal burturstaddur

Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa eina viðmerking frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni í kommunumálum, um hann hevur nýtt revolvaran móti kommununum fyri at fáa tær at góðtaka íløguloftið.

Høgni Hoydal hevur verið á eini ráðstevnu fyri smátjóðir á Álandi seinastu dagarnar og beint áðrenn blaðið fór til prentingar var hann á veg heim við Atlantsflog. Vit royna at fáa eina viðmerking frá honum til týsdagsblaðið.






600 skotar til landsdyst:

# Fótbólturin gevur samfelagnum lív



*600 skotar koma til Føroya, tá Føroyar skulu spæla dyst ímóti Skotlandi. Stórir trupulleikar eru við at fáa pláss til skotarnar at búgva í*

*Savnsmynd*

**Um 600 skotar ætla sær at koma til Føroya til landsdystin millum Føroyar og Skotland tann 7. september á Svangaskarði. Seinast tá Føroyar spældu dyst ímóti Skotlandi, vóru »bert« 150 skotar og stuðlaðu landsliði sínum**

FERÐAVINNA/ FÓTBÓLTUR
*Ingrid Bjarnastein*

Eini 600 skotar fara eftir ætlan at leita sær til Føroya tá Føroyar skulu spæla landsdyst ímóti Skotlandi á Svangaskarði tann 7. september.

Seinast tá landsdystur var millum londini bæði, vóru 150 skotar í Føroyum. Men áhugin fyri at koma henda vegin at hyggja eftir fótbólti, tykist at vera alsamt vaksandi.

– Orsøkin er heilt einføld, sigur Sissal Kristiansen frá Ferðaráðnum.

– Seinast skotar vóru her kendur teir seg vælkomnar. Og tað ganga søgur runt í Skotlandi um, hvussu gestablíðir føroyingar eru.

Upplivilsini, skotarnir hava havt, eru alment kend. Og harafturat, so er lætt at koma til Føroya. Atlantic Airways hevur víst stóra vælvild, tí umframt tær vanligu fýra flogferðirnar, verða fýra aðrar leigurutur settar inn at flúgva skotarnar til fótbólt.

– At koma til Føroya er heldur ikki dýrari at fara aðrastaðni. Skotska landsliðið telist nú heldur ikki millum tey allarbestu í heiminum, og tí vilja skotar eisini stuðla teimum, og síggja hvønn dyst teir møguliga kunnu vinna, greiðir Sissal frá.

## Gott umdømi

Sissal Kristiansen hevur havt samband við skotsk tíðindafólk, sum eru áhugað í Føroyum. – Tey fortelja søgur um, hvussu gestablíðir føroyingar eru, og hvussu gott umdømið hjá føroyingum er niðri í Skotlandi. Føroyingar hava bjóðað skotum inn at gista hjá sær, og sum so líkjast føroyingar og skotar ógvuliga nógv, sigur Sissal Kristiansen.

Eitt, sum er afturvendandi er, at allir skotar kenna Café Natúr á Áarvegnum í Havn. Og hetta er eisini nakað teir vilja síggja og uppliva.

– Tá skotar vóru í Føroyum til landsdyst seinast vórðu føroyingar og skotar ógvuliga væl. Og myndin av teimum gestablíðu føroyingunum er farin aftur til Skotlands, og livir víðari har.

– Café Natúr kenna teir allir, og er hetta nakað teir vilja síggja. Onkur spurdi meg, um ein modell-stova helt til í endanum á Café Natúr, og ein annar spurdi, hvar allir teir ljótu føroyingarnir krógvaðu seg. Á heimasíðuni hjá skotsku landsliðsstuðlunum er Café Natúr eisini nevnt.

Sissal metir, at tað er ein samantvinning ímillum nógv ymisk ting, sum ger, at skotarnir vilja koma til Føroya. Stuttleikin og gestablíðu føroyingarnir eru helst tvær av høvuðsorsøkunum, umframt fótbóltin, sjálvandi.

## Berjast ikki

Fyrr høvdu skotar fyri at berjast eitt sindur tá teir vóru til fótbóltsdyst. Men hendan vanan hava teir lagt niður nú.

– Skotar bardust viðhvørt, men tað gera teir ikki longur. Og hetta umdømið vilja teir gera alt fyri at halda uppi. Fyrr vóru tað skotar, ið bardust, men so fóru onglendingar eisini at berjast – meira enntá, og tá onglendingar eisini fóru at berjast, so vildu skotarnir sjálvsagt ikki vera sum teir, og tí hildu teir uppat, fortelur Sissal Kristiansen.

– Um onkur verður eitt sindur óklárur, so blanda onnur seg uppí og royna at fáa orrustuna í rætt lag aftur.

Spurd um, hvussu nógv fótbólturin hevur at siga fyri føroyska ferðavinnu, svarar hon beinanvegin:

– Hann hevur nógv at siga!

Sissal Kristiansen tekur sær av at marknaðarføra Føroyar í Týsklandi og í Skotlandi, og tað vísir seg, at í Týsklandi vita tey ikki nógv um landið.

– Tað einasta tey vita er grindadráp, og so at Føroyar vunnu á Eysturríki.

Eisini onkur týsk tíðindafólk hava verið í Føroyum, og tá vildu tey sleppa at tosa við onkran, sum var á landsliðnum, tá Føroyar vunnu í Landskrona.

– Nógv verður gjørt burturúr dystinum millum Týskland og Føroyar. Hetta er fyrsti heimadystur hjá Týsklandi síðani HM-kappingina, so hetta er fyrsta ferðin týska fólkið sleppur at síggja teirra fótbóltsspælarar á heimavølli.

Men týskarar vita ikki nógv um Føroyar. Men um fótbóltin vita teir nógv. Á heimasíðuni hjá týska fótbóltssambandinum stóð millum annað fyri stuttum, at í Føroyum var bara ein grasvøllur – í Klaksvík! Men hetta hevur Sissal fingið rættað, men heilt rætt er tað tó ikki enn.

– Hetta sigur bara eitt sindur, hvussu nógv útlendingar vita um okkum, og hvat teir kenna til landið. Og tað er tí fótbólturin hevur so nógv at siga. Eg haldi ikki, at tað er so nógv ein spurningur um hesi viðhaldsfólkini koma aftur. Tað, sum er meira týdningarmikið er, hvat tey siga um okkum tá tey koma heimaftur.

Sissal vísir á, at nógv fólk leita sær hendan vegin, tá landsdystir verða spældir, og so serliga ímóti teimum stóru londunum.

– Á henda hátt verður eisini sett lív í samfelagið, tí tá fólk koma higar, so fyllist, og meira lív kemur í.

## Gistingartrupulleikar

At 600 skotar koma til Føroya í senn er ikki bara sum at siga tað. Onkustaðni noyðast teir jú eisini at búgva. Og tað vísir seg, at ringt er at finna eina song til hvønn.

– Øll hotellini eru full og Bed & Breakfast er eisini fult allastaðni. Skotarnir búgva í Havn, á Eiði, í Runavík – ja, næstan allastaðni teir kunnu. Hvør útleigað song er full, tá teir koma hendan vegin, sigur Sissal Kristiansen.

Men verri enn so allir skotarnir hava fingið innivist enn, og tað er eisini ógvuliga ringt at finna nakað til teir.

– Men tá teir hava hoyrt um, hvussu føroyingar bjóða teimum inn at gista, so haldi eg ikki, at teir leggja so nógv í, um teir ikki hava nakað pláss at sova. Men tað er munur á, at skula finna pláss at sova til 10 av teimum 150, og so at finna pláss til yvir 400, vísir Sissal á.

Skotska fótbóltssambandi hevði fingið eini 800 beinleiðis fyrispurningar um dystin millum Føroyar og Skotland, so tað kann væl vera, at nógv hava broytt meining, tí onki pláss er at búgva.

Men hvussu víkur ella vendir, so verður í øllum førum spennandi inni á Svangaskarði tann 7. september.